# Føroya Blindaastovnur fingið nýggjan leiðara

**Stýrið fyri Blindastovnin hevur sett Karin Kass í starv sum leiðara fyri blindastovnin frá 1. november 1997**

Karin Kass hevur verið í avloysarastarvi á Blindastovninum síðan 1994, tá Jákup Danielsen, fór í farloyvi.

At arbeiða við blindum er ikki nýtt fyri Karina. Hon hevur starvast sum leiðbeinari hjá blindum og sjónveikum undir Landsskúlafyrisitingini til 1994, tá hon tók við avloysarastarvinum á Blindastovninum.

Karin Kass er 37 ára gomul. Hon er útbúgvin ergoterapeut í Århus í 1985. Eftir lokna útbúgving fór hon á Blindainstituttið í Hellerup, og har tók hon eftirútbúgving sum leiðbeinari fyri blind og sjónveik. Hon hevur eisini starvast sum leiðbeinari í Fyns Amt og á Refsnæsskúlanum í Kalundborg, sum er skúli fyri ung blind og sjónveik.

# Hermann Oskarsson búskaparskrivari

**Búskaparráðið hevur sett Hermann Oskarsson í fulltíðarstarv sum skrivara hjá ráðnum. Hermann er útbúgvin cand. polit.**

Hermann Oskarsson er 44 ára gamalur og útbúgvin í 1995 á universitetinum í Keypmannahavn. Í lestrartíðini legði Hermann serligan dent á teoretiskan makrobúskap, økonometri og modellteknikk.

Síðan lokna útbúgving hevur Hermann arbeitt á Hagstovu Føroya við uppgávum serliga í almenna partinum av tjóðarroknskapinum. Hermann hevur skrivað uppgávur um búskaparlig evni og undirvísir á øðrum ári í tjóðarbúskapi á á Føroya Handilsskúla. Hermann Oskarsson tók við starvinum leygardagin 1. november.

# ÍSBLOMSTRIÐ

**Um slakar 14 dagar verður norskur psykologiskur krimileikur, ið Eyð Matras hevur umsett, framførdur í Sjónleikarhúsinum í Havn. Eyð Matras leikstjórnar eisini.**

Leygardagin 22. november verður norski sjónleikurin »Ísblomstrið« eftir Terje Nordby fyri fyrstu ferð sýndur í Sjónleikarhúsinum í Havn.

»Ísblomstrið« er ein psykologiskur krimileikur um ótta, deyða, einsemi og undirverk. Leikurin fer fram í Finnmørkini í 1880'unum og snýr seg um ein gandakall, ið boðsendur er at lekja eina konu.

Sjúka konan liggur í seingini, nærum lamnað av sinnissjúku.

Sum ein rættur detektivur við góðum sálarligum innliti, avdúkar gandakallurin lygnir og eina sera óhumska søgu um hjúnini.

**Mæti gandakallurin**

Gandakallurin kann gera undurverkir, men hann er eisini ein menniskja og verður av álvara drigin inn í stirðna lívið hjá hjúnunum á ísfjallinum.

»Ísblomstrið« hevur støðið úr sagnum og søgum um Johan Kaaven, mætasta gandakalli Noregs, sum doyði í 1918.

Terji Nordby fekk Ibsen virðislønina fyri »Ísblomstrið« í 1995.

Hilmar Joensen hevur leiklutin sum gandakallurin. Jytte Joensen og Karlot Jacobsen spæla hjúnini Jóhanna og Andreas Isaksen.

Eyð Matras, ið hevur umsett leikin, er leikstjóri, og leikbúnarnar og pallmynd hevur Marjun Joanesardóttir gjørt.



Í leikinum »Ísblomstrið« hevur Hilmar Joensen leiklutin, sum gandakallurin. Her heldur hann í ørmunum á ti sinnissjúku konuni Johonnu, Jytte Joensen, meðan maður hennara Andreas, Karlot Jacobsen, ovfarin hyggur at.

Mynd: Kalmar Lindenskov

# Peningagávur givnar til Føroyahúsið

**Føroya Sparikassi hevur latið 10.000 krónur, og Carlsbergs Mindelegat hevur latið 30.000 krónur.**

Gávan frá sparikassanum skal brúkast til nýgerð ella umvæling í Føroyahúsinum. Gávan úr Carlsberg grunninum skal brúkast til nýggja ljóð- og tónleikaútgerð í húsinum.

Umframt peningagávurnar hevur Føroyahúsið fingið 10 eintøk av Føroya Fólks songbók frá H. N. Jacobsens Bókhandli.

## *Minningarorð um Palla*

Palli, ongum tú eftir legði.
Ikki nógv tú segði.
Men tað, tú visti,
bert á høvdinum risti.

Nú ert tú farin.
Altíð líka varin.
Gudrøknari mann,
leingi eftir leita ein kann.

**Annbjørn.**

# Mærsk kannar oljumøguleikar í Føroyum

**Undirstjórin í Mærsk Olie og Gas, ið er dóttirfelag í A. P. Møller samtakinum, váttaði í farnu viku, at teir í spenningi bíða eftir fyrsta útbjóðingarumfarinum í Føroyum.**

DIA MIDJORD

– Mærsk Olie og Gas er við í bólki saman við Fina og Deminex, sum møguliga ætlar at vera við í fyrsta útbjóðingarumfarinum, segði Bo Wildfang, undirstjóri í Mærsk Olie og Gas við Reuters Finans fríggjadagin.



Eisini Dong, Dansk Olie og Naturgas kannar møguleikarnar í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfari. Hesin bólkur er saman við Amerada Hess, Lasmo og Norsk Hydro.

Danir eru sostatt væl umboðaðir í sambandi við eitt møguligt oljuævintýr í Føroyum.

# Málverji skeyt mál frá 100 metra fjarstøðu

Spanski málverjin Inigo Artega, sum leikar við Racing Ferrol fekk navn sítt í alheims metbøkur, tá hann sunnudagin megnaði at fáa mál við einum málsparki.

Artega skeyt annað av málunum, sum Racing Ferrol fekk í dystinum. Tað var við spenningi, at áskoðarnir sóu bóltin fara teir 100 metrarnir inn í málið, har málverjin hjá Moralo, Jose Peralta, bilsin sá bóltin liggja í netinum.

1. July broytti FIFA reglurnar so, at tað varð loyvið at skjóta mál við einum málsparki.

Liðið Racing Ferrol, sum spælir í sponsku triðju deild, hevur hóast tað ikki nógv at fegnast um í teirra 80 ára gomlu søgu. Einasta avrik, sum teir kunnu fegnast um er, ein finaludystur í sponsku kappingini í 1935.

Í hvussu so er og ikki, so hava teir við sermerkta málinum hjá Inigo Artega, fingið eitt pláss í sponsku fótbóltssøguni.



**Prestur drap familjuna hjá sær:**
Løgreglan fer her avstað við prestinum Andras Pandy (í miðjuni), sum er lagdur undir at hava dripið seks fólk í familjuni hjá sær. Løgreglan førdi prestin til eitt av hansara trimum húsum fyri at kanna, um nøkur lík vóru harinni. Herfyri fann løgreglan leivdir av í minsta lagi trimum fólkum í einum øðrum húsi hjá ungarsk-føddа prestinum

Mynd: Yves Herman/REUTER

